# Berbatov skal ongan veg

Áhaldandi søgur ganga um, at Dimitar Berbatov skal seljast frá enska felagnum Tottenham, har hann staðið seg framúr væl seinasta árið. Berbatov kom til Onglands fyri einum ári síðani, og hann hevur í sínum fyrsta kappingarári skotið heili 22 mál. Hetta hevur fingið fjølmiðlar at seta Berbatov í samband við Manchester United og Chelsea, men boðini frá nevndarformanninum í Tottenham eru púra greið: Hvørki Berbatov ella aðrir profilar hjá felagnum verða seldir í summar. Felagið ætlar sær at náa enn longri og vinna seg í Champions League.



# Venjarin tók ábyrgd av tapi

Venjarin hjá Vejle segði eftir 3-0 tapi í superliguni í gjár, at hansara mistak var orsøk til tapið.

- Vit vóru sera troyttir, og eg má viðurkenna, at eg havi kravt ov nógv av somu spælarum í longri tíð, og tað sást aftur í dag. Hevði eg havt valt øðrvísi, so kundu vit havt fingið eitt frægari úrslit, segði Ove Christensen eftir dystinum ímóti OB.

Undan hesum dystinum hevði Vejle vunnið tríggjar dystir á rað og skapt spenning í botninum í superliguni.

# Massa vann sannførandi

**Einans 14 bilar komu á mál í sponsku formil 1 koyringini. Millum teir, ið steðgaðu, var Kimi Räikkönen, ið á degnum ivaleyst var einasta koyrari, ið kundi avbjóða liðfelagan Felipe Massa, Ferrari tyktust ikki at vera til at nerta.**



*Massa og Alonso í tøttum nærdysti í fyrsta svingi, bilarnir nortu hvør annan, og Alonso fór av breytini, meðan Massa helt oddasessin*

*Mynd: Polfoto*

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Eftir á 65 umfør á Circut de Catalunya uttan nakran veruligan avbjóðara koyrdi brasiliumaðurin Felipe Massa sín Ferrari bil fyrstur um málstrikuna. Einastu ferð hann var trýstur var í fyrsta svingi, tá Fernando Alonso roydni at sleppa framvið honum. Men Massa bakkaði ikki úr nærdystinum, og endin var at Alonso var trýstur av breytini, og sá Hamilton og Räikkönen koyra framvið sær.

### Eldur í Massa

Ein vandamikil støða stóðst av fyrsta pitstoppinum hjá Massa, eldur kom í avlopsbrennievnið til bilin, og Massa koyrdi avstað við stórum lógum av eldi í bili sínum, vindurin og ferðin sløkti tó eldin beinanvegin, og tá Massa var spurdur um hesa hending á tíðindafundinum visti hann einki um eldin.

- Ná, tað havi eg slettis ikki lagt til merkis, um ein tílík støða hevur verið, so hevur liðið ivaleyst tikið sær av tí, segði hann.

### Hendingarík koyring

Spanska koyringin var bæði spennandi og hendingarík, og hóast spenningur ongantíð veruliga var um hvør fór at vinna, ella hvør fór at gerast nummar tvey, so vóru nógvir tættir nærdystir longri afturi.

Longu í sjálvari byrjanini fekk Trulli trupulleikar, tí var umstartur dømdur, og Trulli mátti byrja úr pittinum. Hansara bilur gav tó upp anda eftir níggju umfør. Á fyrsta umfari rendi Alexander Wurz ipp í afturpartin av bilinum hjá Ralf Schumacher. Báðir koyrdu beint í pitt, har Wurz gavst. Ralf Schumacher mátti eisini seinni gevast.

Räikkönen fekk elektriskar trupulleikar við bili sínum og mátti gevast av triðja plássi eftir 10 umfør. Og soleiðis helt fram.

## Spanska koyringin

| Úrslit | Bilførari | Lið | Stig |
|---|---|---|---|
| 1 | Felipe Massa | Ferrari | 10 |
| 2 | Lewis Hamilton | McLaren-Mercedes | 8 |
| 3 | Fernando Alonso | McLaren-Mercedes | 6 |
| 4 | Robert Kubica | BMW | 5 |
| 5 | David Coulthard | Red Bull-Renault | 4 |
| 6 | Nico Rosberg | Williams-Toyota | 3 |
| 7 | Heikki Kovalainen | Renault | 2 |
| 8 | Takuma Sato | Super Aguri-Honda | 1 |
| 9 | Giancarlo Fisichella | Renault | |
| 10 | Rubens Barrichello | Honda | |
| 11 | Anthony Davidson | Super Aguri-Honda | |
| 12 | Jenson Button | Honda | |
| 13 | Adrian Sutil | Spyker-Ferrari | |
| 14 | Christijan Albers | Spyker-Ferrari | |
| - | Nick Heidfeld | BMW | |
| - | Ralf Schumacher | Toyota | |
| - | Vitantonio Liuzzi | STR-Ferrari | |
| - | Scott Speed | STR-Ferrari | |
| - | Kimi Räikkönen | Ferrari | |
| - | Jarno Trulli | Toyota | |
| - | Mark Webber | Red Bull-Renault | |
| - | Alexander Wurz | Williams-Toyota | |

## HM fyri bilførarar

| Støða | Navn | Land | Stig |
|---|---|---|---|
| 1 | Lewis Hamilton | Ongland | 30 |
| 2 | Fernando Alonso | Spania | 28 |
| 3 | Felipe Massa | Brasilia | 27 |
| 4 | Kimi Räikkönen | Finland | 22 |
| 5 | Nick Heidfeld | Týskland | 15 |
| 6 | Robert Kubica | Póland | 8 |
| - | Giancarlo Fisichella | Italia | 8 |
| 8 | Nico Rosberg | Týskland | 5 |
| 9 | David Coulthard | Skotland | 4 |
| - | Jarno Trulli | Italia | 4 |
| 10 | Heikki Kovalainen | Finland | 3 |
| 11 | Ralf Schumacher | Týskland | 1 |
| - | Takuma Sato | Japan | 1 |

## HM fyri lið

| Støða | Lið | Stig |
|---|---|---|
| 1 | McLaren-Mercedes | 46 |
| 2 | Ferrari | 33 |
| 3 | BMW | 15 |
| 4 | Renault | 10 |
| 5 | Williams-Toyota | 5 |
| 6 | Red Bull Racing Renault | 4 |
| 7 | Toyota | 3 |
| 8 | Super Aguri - Honda | 1 |

# Hamilton skrivar søgu

**Lewis Hamilton er við sínum øðrum plássi í formil 1 koyringini í Spania einsamallur á odda í HM kappingini, við hesum skrivar ungi bretin søgu**

FORMIL 1

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Nýggja stjørnuskotið í formil 1, Lewis Hamilton var ein sera nógv eftirspurdur maður í sambandi við sponsku formil 1 koyringina, og tað er ikki uttan orsøk. Ungi bretin er fyrsta veruliga vónin um ein heimsmeistara í bretar hava havt síðan Damon Hill. Í sjálvari koyringini megnaði Hamilton við einum øðrum plássi at tryggja sær einsamallur at eiga odddasessin í HM. Hetta ger Hamilton til yngsta koyrara, ið nakrantíð hevur ligið á odda í HM. Eisini er hetta fyrstu ferð síðan í 1959, at ein formil 1 koyrari, ið onga koyring hevur vunnið liggur á odda í HM. Hamilton hevur verið tann mest støðugi av koyrarunum í ár við triðja plássi í Avstralia og við øðrum plássum í Maleisia, Barein og nú í Spania. Samstundis hava Räikkönen, Alonso og Massa býtt sigrarnar millum sín. Tí liggur Hamilton nú á odda tvey stig frammanfyri liðfelagan Alonso og ávíkavist 3 og 8 stig frammanfyri Massa og Räikkönen. Áðrenn hesa koyringina, lá Hamilton ájavnt á stigum við Räikkönen og Alonso, men teirra sigrar gjørdu, at hann ikki átti sjálvan oddasessin.

*Lewis Hamilton kundi fegnast um at liggja á odda í HM eftir sponsku formil 1 koyringina*

*Mynd: polfoto*

